## VIÐMERKINGAR

# Tjóðveldisflokkurin fer eftir ábyrgd og rættindum, tí fer hann bara fram

**Annita á Fríðriksmørk**



"Samstarv er vegurin fram". Soleiðis ljóðar slagorð Sambandsfloksins í hesum fólkatingsvalstríði.

Tjóðveldisflokkurin er púra samdur!

Munurin hjá heusm báðum flokkum er bara undir hvørjum fortreytum samstarvið skal byggja.

Sambandsflokkurin sigur, at endamálið við samstarvinum við danir er friður og semja og at hetta skal gerast fyri ein og hvønn prís.

Men skal friður og semja valda landanna millum, mugu fortreytirnar fyri samstarvinum verða tær somu.

Tað er ov bláoygt at lata alt vald til donsku stjórnina og so bara vænta, at úrslitið av tí er friður og semja.

Slíkt forkar seg eitt fet til viks og trý aftur.

Onkin stjórn — heldur ikki tann danska — hevur nakra sum helst virðing fyri slíkum bláoygdum politikki.

Erlendur Patursson hevði stóra virðing millum tað danska fólkið, og millum teir donsku politikararnar. Tað sama kann sigast, um tvey tey undanfarnu fólkatingsumboðini hjá Tjóðveldisflokkinum. Orsøkin til hesa virðing er eina og aleina, at hesir hava umboða eina hugsjón, sum vil fram á leið. Eina hugsjón, sum sigur, at føroyingar og bara føroyingar í samstarvi við onnur lond, kunnu fáa Føroyar fram á leið.

Sambandsómegdin, sum heldur uppá, at alt uttanríkisvald og allur føroyskur yvirvaldsrættur treytaleyst skal latast til danir at hava ábyrgdina av, skapar ikki virðing millum donsku politikararnar. Hetta tekur hinvegin fyrst og fremst ábyrgdina frá okkum føroyingum og forðar harvið fyri framburði. Harnæst gevur henda ómegd eisin donsku stjórnini frítt spæl at nokta føroysku tjóðini viðurkenning sum tjóð, hon gevur donsku stjórnini frítt spæl at nokta móðirmálið okkara viðurkenning sum tjóðarmál føroyinga. Bláoygni Sambandsfloksins er snøgt sagt eitt haft um beinini á øllum framburði, og er samstundis ein kærkomin gáva til eina yvirvøld, sum ynskir at vísa fyri umheiminum, hvør í ræður í danska ríkinum, og hvørja støðu fólkini í útnorði hava.

Ynski um hetta ábyrgdarloysi, hevur eisini víst seg at givið hesum somu fólkatingspolitikarum munnkurv. Hetta vísir seg millum annað í teimum stigum, sum tikin eru í á Fólkatingi av føroyskum fólkatingslimum seinastu 7 árini:

Síðani ´98 hava ABC umboðini reist tilsamans 13 mál á Fólkatingi (knøpp tvey mál um árið)

Tjóðveldisumboðini einsamøll hava reist 66 (seksogtrýss) mál seinastu 4 árini.

Manglandi ynski eftir ábyrgd forkar føroyskan politikk og rættindi eitt fet til viks og trý aftur

Tjóðveldisflokkurin fer eftir ábyrgd og rættindum tí fer hann bara fram.

# Frælsið at velja

**Tórhallur Áslaksson**
*Tjóðveldisflokkurin*



Kári P syngur um "frælsið at velja hvønn ein skal selja seg sjálvan og frælsið sítt til"

Fólkaflokkurin hevur selt sína sál til teir konservativu, alt sum kann skaða sosialismuna sigur Breckmann. Javnaðarflokkurin stuðlar Mogens Lykketoft og Sambandsflokkurin stuðlar Anders Fogh. Einasti flokkur sum ikki hevur selt seg áðrenn valið, er Tjóðveldisflokkurin.

Tjóðveldisflokkurin fer at selja sína atkvøðu har vit fáa mest fyri hana og ikki lata nakran dana ella danskan flokka sína atkvøðu / ur framíhjá.

Tjóðveldisflokkurin fer á fólkatingi framhaldandi at arbeiða fyri upplýsing til bæði føroyingar og danir og grønlendingar, at avdúka hvussu danir hava villleitt altjóða felagskapir og tala ósatt um viðurskiftir í ríkisfelagsskapinum, sum teir kalla tað.

Tín atkvøða er avgerandi eisini til hettar valið.

Vel lista E

# Suðuroyarætlan

**Jón Guttesen**
*Trongisvágur*

Loksins var suðuroyarætlanin borðin heim í húskini í suðuroynni og tað er væl skilligt at suðuroyingar kenna seg vónbrotnar. Sigast má eisini at bráðfeingishjálp til suðuroynna ikki er at finna í nakrari ætlanin.

Men eg ætlaði at tríva í okkurt sum ikki hevur verðið nevnt í kjakinum farnu tíðina.

**Sjálvbjargni**

Sjálvbjargni og drívmegin og ynski um sjálvbjargni er fremsta tilfeingi hjá einum fólki. Hetta býr eisini í suðuroyingum og hetta eiga suðuroyingar ikki at lata frá sær til nakra samgongu. Suðuroyarætlanin sum fyriliggur eigur at styrkja okkum í, at vit sjálvi sita við framtíðini í okkara hondum og at tað er okkara máttur og dirvið sum skapar framtíð her suðuri.

Nýstovnaða íleggjarafelagi hjá Suðuroyar Sparikassa prógvar viljan til at skapa virksemi í oynni.

**Samhaldsfesti**

Suðuroyingar eiga at ásanna at hvør stertur sum kemur á land her suðuri og hvørt arbeiðspláss sum verður skapt í oynni kemur øllum suðuroyingum til góðar. Hvør vøra og tænasta sum verður seld uttanlands ella norðureftir, kemur øllum suðuroyingum til góðar. Somuleiðis er hvør arbeiðstøkur suðuroyingur og hvør ungdómi farin av oynni, ein missur fyri alla oynna. Áhaldandi sundurlyndi er ein forðing í menningini av oynni.

Nýstovnaða alivirkið er prógvið ið vísir at vit megna. Fremsti eginleiki hjá nýggju fyritøkuni er at hon hevur ringar á fyrðum kring allað oynna. Somuleiðis er virkið komi í lag í við íleggjarum úr báði Tvøroyri og Vági.

**Nýggjar landsíløgur**

Tørvur er á áhaldandi íløgum fyri at hava virksemi í oynni. Hov-Øravík bergholið og miðnámsskúli eru verkætlanir sum vóru raðfestar av undanfarnu samgongu. Sitandi samgonga eigur at taka táttin upp og fáa raðfest nýggjar íløgur í oynni, so at steðgur ikki kemur í virksemi.

**Aðrar vinnugreinir**

Suðuroyggin má gerðast minni bundin av fiskatilfeingi. Einoygd fokusering á fiskatilfeingi og flakavinnu forðar fyri menning av øðrum vinnugreinum og fyri ílegum í aðrar vinnugreinir. Vit mugu sýggja okkara tilfeingi í síni heild.

Møguleikarnir í ferðavinnuni eru als ikki troyttir. Illvilji móti at játta pening til ferðavinnuna má fáast burtur og neyðugt er at seta professionella leiðslu til at savna og menna ferðavinnuna her suðuri. Ein sterk ferðavinna gevur arbeiði til ófaklærd og er ein náttúrligur avtakari av einum parti av tí arbeiðsmegi sum nú gongur fyri einki.

**Almenn arbeiðspláss**

Samgongan eigur at taka málið um strandferðsluna uppaftur, sum varð so dyggiliga vrakað fyri árið síðani. Almannastovan frátikin, tá er strandferðslan helst einasti almenni stovnur sum hevur meginpartin av sínum virksemi í Suðuroynni. Eftir at farmaleiðir eru einskjildar og siglingin um Leirvíksfjørð steðga, er fremsta endamál hjá strandferðsluni at reka suðuroyarleiðina. Tað er sjálvssagt at strandferðslan skal virka úr Suðuroynni.

**Almenn fjarstørv**

Ásannandi tann trekleika sum er í móti at flyta almenn arbeiðspláss til útjaðaran, eigur løgmaður at seta fram krav um, at starvandi fáa møgulleika at búgva í útjaðaranum samtstundis sum tey starvast í almennu fyrisitingini. Hetta tí løgmaður er fremsti myndugleiki í almennu fyrisitingini. Somuleiðis eigur landsstýri at seta fram krav um, at allir almennir stovnar sum landstýri varðir av, hava ein starvsfólkapolitik sum loyvir teirra starvsfólkum at fjarstarva. Miðsavningin av førleikakrevjandi størvum má mótvigast við, at tey starvandi fáa møguleika at búgva á útoyggj og í útjaðaranum.

**Fleiri útbúgvingar**

Suðuroyggin er við skerdan lut tá tað ræður um útbúgvingar. Byggingin av einum nýggjum Almanna- og Heilsuskúla (AHS) skal ikki tarnast. Heldur skulu bý- og bygdaráðini savnast um nýggja skúlan, og krevja at møgulleiki verður fyri at skúlin í framtíðini eisini kann hýsa útbúgvingini sum sjúkrarøktarfrøðing. AHS, saman skúlum norðanfyri, prógvar at tað ber væl til at hava útbúgvingarstovnar úti um landið.

**Sjálvbjargni aftur**

Men sum eg byrjaði við. Sjálvbjargni og drívmegin og ynski um sjálvbjargni er fremsta tilfeingi hjá einum fólki. Hetta býr eisini í suðuroyingum og hetta eiga suðuroyingar ikki at lata frá sær til nakra samgongu. Suðuroyarætlanin sum fyriliggur eigur at styrkja okkum í, at vit sjálvi sita við framtíðini í okkara hondum og at tað er okkara máttur og dirvið sum skapar framtíð her suðuri.

# Hugskot til Løgtingið um at bjarga Føroyum og Suðuroy

**Petur Dahl Nolsøe,**
*í Vági*

Fiski- og útróðramenn úr Sri Lanka og Indonesia hava mist túsundtals útróðrarbátar (trillur) og sjórænararnar-bíbeturnæstan allar.

Hvat hevði verið meiri hjálptsamt av okkum føroyingum enn at bygt einar 1000- 2000 smábátar til neyðhjálp?

Sjálvandi skuldu vit havt hugsað um hetta, áðrenn tann velduga innsavningin varð gjørt eftir ársskiftið!

Eru tað ikki grunnar í Danmark, ella í Norðurlondum, ella í ES, sum kunnu stuðla Awi-boats, ella Hvalvík, ella um fleiri smábátarvirki eru í Føroyum- at bygt hesar bátar fyri 200.000-300.000 krónur fyri hvønn?

Ein fín skipasmiðja er í Vági í Suðuroy. Tað kundi givið arbeiði eini 10 ár fram í tíðina.

Komið nú- komið nú, ímeðan landstýrið brýtur svøvn fyri at bjarga syðru helvt ella allari Suðuroynni. - Finni okkurt "hol" har. Lat ikki alt hava stert, sum skal bjarga øllum.......

Bert eitt hugskot.

E.S: Fyri 13 árum síðani fortaldi ein boripallsverkfrøðingur mær umborð á Smyrli, at bretar fyri langari tíð síðani vóru farnir at bora horisontalt og at teir vóru langt inni undir okkara fiskimarki.